**Býráðsfundur hósdagin 29. apríl 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **13/00188**<br>**Umsókn frá G! Grunninum um tilmæli til tiltaks- og konsertloyvi til G! Festival 2013**<br>Mentanarnevndin mælir til at viðmæla tiltaks- og konsertloyvi. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini<br><br>*Oluffa Joensen var úti undir viðgerðini, vegna ógegni.* |
| 2. | **13/00189**<br>**Umsókn frá G! Grunninum um rættin til at skipa fyri tiltøkum á kommunalum øki 2013**<br>Mentanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti | Einmælt samtykt at G! Grunnurin fær rættin at skipa fyri tiltøkum s.s konsertum, tjalding o.ø í Eysturkommunu í tíðarskeiðnum tá G-festivalurin er.<br><br>*Oluffa Joensen var úti undir viðgerðini, vegna ógegni.* |
| 3. | **13/00145**<br>**Val av hegnsýnisnevnd**<br>Á býráðsfundinum tann 25/3-13 vóru 3 limir valdir, 2 skulu veljast aftuar og mælt verður til at velja Ólavur Eliasen og Esmar Mikkelsen | Einmælt samtykt at velja Ólavur Eliasen og Esmar Mikkelsen. |
| 4. | **13/00168**<br>**Umsókn frá Skótaliðnum Leirvíks Páll um fíggjarligan stuðul**<br>Mentanarnevndin mælir til at stuðla við 40.000 kr.<br><br>Upphæddin verður tikin av konto nr. 5.24.14.510 – 20 “Stuðul til ítrótt”<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini. |
| 5. | **12/00206**<br>**Umsókn frá Losjan Glotti um fíggjarligan stuðul til viðlíkahald og keyp av útgerð**<br>Mentanarnevndin mælir til at stuðla við 50.000 kr.<br><br>Upphæddin verður tikin av konto nr. 5.24.14.510 – 10 “Stuðul til mentan” | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur hósdagin 29. apríl 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

6. **12/00399**

**Umsókn frá Tónleikasamtakinum Grót um fíggjarligan stuðul til viðlíkahald og keyp av útgerð**

Mentanaranevndin mælir til at stuðla við 40.000 kr.

Upphæddin verður tikin av konto nr. 5.24.14.510 – 10 "Stuðul til mentan"

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Oluffa Joensen var úti undir viðgerðini, vegna ógegni.*

7. **12/00349**

**Umsókn um at økja um grundøkið til matrikul 23, Fyri oman Brúgv 2, Syðrugøta – ella at gera flísatún**

Umsøkjarin, Ólavur Gregersen, hevur ynskji um, at leggja flísar á túnið hjá teimum og nakað inn á kommunalt øki. Kommunan hevur gjørt eitt uppskot til flísar fram við vegnum/gongubreytir og økið rundanum sambært verkætlan ið kommunan hevur gjørt fyri økið Syðrugøtusandur. Teknistovan hevur gjørt uppskot til flísar á gongubreytir og tún sum her verður lagt fram til góðkenning.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt at biðja Teknistovuna gera tillagingar av økinum millum vegin Gróargøta og oman á sandin við atliti til, at stórir pallur kann koyrast oman á sandin. Somuleiðis skal integrerast brúsir á økinum til tey sum baða á sjónum og spæla á sandinum. Samstundis verður kannað um kloakkleiðingar skulu flytast ella leggjast um, umframt kostnaðin til eina serstaka flís við búmerkinum hjá kommununi og ljós á økið.

Somuleiðis er samtykt at bjóða arbeiði við álegging av flísum á kommunalt øki. Arbeiði verður bjóða út sum undirhondsboð til 2 arbeiðstakarir – múrari

Samtykt at beina málið aftur í nevnd til viðgerðar.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Hanna Jensen

**Býráðsfundur hósdagin 29. apríl 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

Jan Andersen, Klaksvík og Ingolf Hansen, Runavík.

Í tilmælinum frá teknisku umsiting verður sagt at arbeiðið kann fíggjast av konto 6.11.32.510 (**fríðkan av bygdini**). Núverandi játtan á hesi konto røkkur ikki til hetta, og tískil má onnur játtan fáast um arbeiðið skal gerast.

Fíggjarnevndin mælir til at umsóknin frá Ólavi Gregersen verður gingin á møti, og at áleggingin av flísum á kommunal øki verður gjørd í samráð við umsitingina hjá Eysturkomunu.

**8. 13/00070**

**Dagføring av bátahylinum í Norðragøtu**

Vinnunevndin umrøddi málið á fundi tann 14. februar í 2013, og samtykt at arbeiða víðari við at gera eina heildarætlan fyri bátahylin.

Eingin peningur er avsettur til hetta arbeiðið. Men á seinasta býráðsfundi tann 25/3-13 bleiv samtykt, við 1. viðgerð av eykajáttan, at játtað 200.000,00 kr. til bátahylin í Norðragøtu, 2.viðgerð verður á komandi býráðsfundi sum verður tann 29/4-13

Umsitingin mælir til at ein heildarætlan verður gjørd, og at arbeiðið við at gera hesa ætlan verður gjørd av uttanhýsis ráðgevara, av tí at orka ikki er í umsitingini at gera hetta.

Vinnunevndin mælir til at biðja Teknistovuna í Gøtu um at gera uppskot til heildarætlan fyri bátahylin, við ætlitið til skipan av havnaøkinum í famtíðini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**9. 13/00180**

**Umsókn um fígging av Báta – og listasavninum í Leirvík**

Nevndin fyri Báta – og listasavnið í Leirvík hevur sent umsókn um rakstrarstuðul, søkt verður um

Fyrst bleiv atkvøtt um tilmælinum hjá vinnunevndini og minnilutanum í fíggjarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Býráðsfundur hósdagin 29. apríl 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

150.000,00 kr.

Eingin játtan er til hetta og um umsóknin verður gingin á møti verður neyðugt við eykajáttan Umsitingin mælir til at umsóknin verður gingin á møti.

Mentanarnevndin mælir til at umsiting arbeiðir víðari við málinum og biður um virksemis – og rakstrarætlan fyri Báta - og listasavnið og samanbera við t.d. virksemi í Blásastovu, eisini í mun til lóggávu.

Vinnunevndin mælir til at játtað 70.000,00 kr. soleiðis at savnið kann verða opið fastar tíðir í tíðarskeiðnum frá mei til og við august, umframt at nevndin kann gera tilfar o.a viðv. bátasavninum.

Vinnunevndin mælir eisini til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, um at gera eina virksemis- og rakstraræltan fyri báta- og listasavnið.

Meirlutin Brandur Jacobsen og Hjalti Dalheim, mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Minnilutin Jóhan Christiansen mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og at peningurin verður tikin av konto 5.24.32.510 *(Søvn og mentanararvur)*

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá mentanarnevndini og meirlutanum í fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Hanna Jensen

**Atkvøddi blankt:**
Jóhan Christiansen, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen

Sostatt er samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og meirlutanum í fíggjarnevndini.

**10.** **13/00141**
**Fyrispurningur um Eysturkommuna er áhuga at keypa sethús í Syðrugøtu**
Hans Jákup Mikkelsen, hevur sent kommununi fyrispurning um Eysturkommuna er áhuga í at keypa húsini (hjá Skræddaranum). Hann keypti húsini fyri 1½ ári síðani.

Eingin peningur er avsettur til keyp av húsunum, og um avgjørt verður at keypa húsini, verður neyðugt við eykajáttan.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 29. apríl 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

Umsitingin mælir frá at Eysturkommuna keypir húsini. Men um so er, at tey verða keypt, mælir umsitingin til at húsini verða tikin niður, og at peningur verður játtaður til hetta, umframt sjálvt keypið av húsinum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**11.** **13/00201**

**Endurgjald til lærarar fyri koyring millum skúlanar í kommununi.**
Skúlastjórin, og formaðurin í skúlastýrinum hava ynski um at kommunan letur endurgjald fyri koyring hjá lærarunum/skúlastjóranum millum skúlanar í kommununi. Skotið er upp at skúlastjórin fær eitt fast gjald á 500,00 kr. um mánaðin. Tá viðvíkur lærarunum, verður m.a víst til skipanina man hevur í Runavík, har lærarar fáa 3,20 fyri kilometurin, sum er tann almenni taksturin.

Eingin peningur er avsettur til hetta í verandi fíggjarætaln, men talan verður neyvan um nakra stóra upphædd, og tí kann tað vera at fíggingin kann finnast á verandi játtan.

Fíggjarnevndin mælir til at skúlastjórin fær 500,00 kr/mðr. og at lærarar fáa endurgjald sambært almenna takstinum. (fjarstøðan millum skúlarnar er 12 km. aftur og fram)

Samlaða upphæddin sum verður nýtt kann tó í mesta lagi verða 40.000,00 kr. um árið.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Hanna Jensen, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Emma Rasmussen.

**12.** **13/00211**

**Grundstykkjaprísir**
Fíggjarnevndin mælir til at lækka grundstykkjaprísin frá 300 kr. $m^2$ til 150 kr. $m^2$. ,og at íbindingargjaldið verður avtikið

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

**13.** **13/00152**

**2.viðgerð av eykajáttanum í samb. við gjøgnumgongd av fíggjarætlan 2013**

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**Býráðsfundur hósdagin 29. apríl 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

1. viðgerð var á seiansata býráðsfundi og tá vóru hesar eykajáttanir samtyktar:

**Løgujáttanir:**

- 1.540.000,00 kr. á konto 6.30.21.511 **(Vatnveiting)**
- 900.000,00 kr. á konto 6.30.41.511 **(Kloakkir)**
- 1.185.000,00 kr. á konto 4.23.22.511 **(Fólkaskúlin)**
- 440.000,00 kr. á konto 7.38.14.511 **(Havnir og lendingar)**
- 2.040.000,00 kr. á konto 5.24.62.5111 **(Ítróttaranlegg)**
- 1.500.000,00 kr. á konto 3.26.11.511-20 **(Frítíðarheim)**
- 600.000,00 kr. á konto 3.26.11.511-10 **(Barnagarðar)**
- 300.000,00 kr. á konto 5.24.13.511 **(Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð)**
- 150.000,00 kr. á konto 6.22.11.510 **(Byggibúning bústaðir)**
- 400.000,00 kr. á konto 6.11.32.511 **(Fríðkan av kommununi)**
- 300.000,00 kr. á konto 6.38.11.511 **(Vegir)**

**Rakstrarjáttanir:**

- 200.000 kr. á konto 6.11.32.510 **(Fríðkan av kommununi)**
- 200.000.00 kr. á konto 1.11.11.510 **(Samsýning til kommunustýrislimir)**

Eykajáttaninar verða fíggjaðar við 4.755.000,00 kr. av innistandandi og 5.000.000,00 við lántøku.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

**14.** **13/00212**
**Umsókn um fíggjarligan stuðul til at lata barn ganga í frískúlanum í Kelduni**

Samtykt at ganga umsóknini á møti

**Býráðsfundur hósdagin 29. apríl 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hanna Jensen, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Emma Rasmussen

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joensen

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________